Álit

í

løgtingsmáli nr. 59/2022: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um meirvirðisgjald (Meirvirðisgjaldslógin) (Longd freist fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi)

Ruth Vang, landsstýrismaður í fíggjarmálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 15. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 20. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Próstadømisráðið saman við Føroya Stiftsstjórn og landsstýrismannin í fíggjarmálum saman við Taks.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Umsóknarfreistin fyri at fáa endurrindað meirvirðisgjald av íløgum í almannagagnligt frítíðarvirksemi gekk út 31. desember 2022, og heimild er sostatt ikki fyri, at nýggjar verkætlanir kunnu gerast partur av skipanini, sum støðan er.

Nevndin tekur undir við Fíggjarmálaráðnum um, at tað hevur verið ein góð skipan, ið stuðlar felagslívinum kring landið, og at skipanin eigur at halda fram.

Nevndin metir somuleiðis, at skipanin tænir sínum endamáli, tá tað í miðal verða endurgoldnar umleið 17 milliónir krónur um árið fyri slíka bygging.

Skattamyndugleikin hevur víst á ivamál, um kirkjuskattur kann koma undir at vera gáva ella sjálvboðið og óløgt arbeiði. Nevndin tekur undir við nágreiningini, at sjálvboðin innsavning, heruppií vanligur og staðbundin kirkjuskattur, eigur at vera partur av grundarlagnum fyri at gerast ikki vinnuligt, almannagagnligt frítíðarvirksemi.

Tað eru í løtuni fleiri verkætlanir ávegis, har henda skipan er ætlað at vera partur – millum annað hevur fólkakirkjan 14 verkætlanir kring landið, ið eru ávegis.

Skipanin við afturbering av meirvirðisgjaldi kom upprunaliga í staðin fyri stuðulsjáttan á fíggjarlógini, sum hevur givið teimum, ið fáast við slíkar verkætlanir kring landið, ein fastan leist, har tað ber til at siga frammanundan, um stuðulin fæst ella ikki. Tó hevur hendan skipanin somu umsitingarligu avleiðingar, sum aðrar skipanir, har stuðul verður veittur gjøgnum frítøku av meirvirðisgjaldi.

Nevndin leggur til merkis, at tað ikki tykist vera nøkur serstøk orsøk til, at skipanin skal leingjast við trimum árum hesaferð, og mælir tí til, at skipanin verður longd við 5 árum í hesum umfari. Hetta verður somuleiðis tilmælt havandi í huga, at partur longu er farin av hesum árinum, og at íløgur í ítróttaranlegg, samkomuhús, kirkjur, skótahús o.s.fr. ofta taka langa tíð at fremja í verki, frá tí at hugskotið er til staðar, til verkætlanin er veruleiki. Nevndin heitir somuleiðis á Fíggjarmálaráðið at gera eina eftirmeting av skipanini, áðrenn hon verður løgd fyri Løgtingið aftur,

so støða kann takast til, hvørt skipan skal gerast varandi ella broytast, nú hon hevur virkað fyribils í meira enn 10 ár.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 1 verður í stk. 2, nr. 3) ”2025” broytt til: ”2027”.

Viðmerkingar:
Við hesi broyting verður skipanin longd við 5 árum heldur enn við 3 árum.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 28. apríl 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Hanna Jensen
Eirikur í Jákupsstovu	Bjarni Hammer	Steffan Klein Poulsen
	Magnus Rasmussen	